# Givið 1600 føroyingum lívið aftur



## Um ein mann, sum 25 ára gamal fyrstu ferð smakkaði dropan, og sum gjørdist alkoholikari við brestin og ár seinni í eini viðgerð í Íslandi lærdi at liva við alkoholismuni edrúur og sum síðan fór í hernað móti alkoholismuni hja túsundtals landsmonnum, snýr hendan søgan seg um

Síðan Heilbrigdið læt upp í desember 1986 hava 4000 føroyingar verið í viðgerð. Av hesum eru 1600 fyri vist edrúir í dag. Ingi Mohr er sjálvt navnið aftanfyri hendan stovn.

Vit skrúva tíðina knappliga sjeytjan ár aftur 25 dagar eftir ólavsøku. Greinahøvundurin ferðaðist tá á botni í samfelagnum og vaknaði eftir drúgvan rús upp aftur á Heilbrigdið á Velbastað. Her lá hann saman við nógvum øðrum alkoholikarum, sum spakuliga vóru á veg upp á turt eftir tjóðarhátíðina. Fret- og sveittaroykurin hekk ramur í luftini og menn vóru tigandi.

Einasta røddin, sum veruliga hoyrdist, var klára røddin á Inga Mohr, sum er leiðari á stovninum. Hann prátaði við teir ymisku sjúklingarnar, hevði glimt í eyganum, troystaði og uggaði, kelaði ikki fyri nøkrum, tosaði beinleiðis, kallaði ein spaka fyri ein spaka, fýrdi onkra sjofla av, tosaði um Gud og fanan, alt í einum.

Og nú eru vit frammi við friggjadagin 4. juli í ár, tjóðardag amerikumanna, og vit hava sett 66 ára gamla Inga Mohr stevnu í Rúsuni í Havn til myndatøku. Hetta er rættuliga súmbolskt, tí sjúklingarnir, hann hevur havt við at gera seinastu mongu árini, hava rættiliga tætt og professionelt tilknýti til Rúsuna. Teir eru millum tey tíggju prosentini av teimum, ið drekka, sum ikki tola rúsdrekka og sum frálíður menna alkoholismu, ein sjúka, sum er eins invaliderandi sum aðrar herviligar sjúkur.

Ingi er broyttur seinastu 17 árini. Tað eru vit øll. Hann er ein almennur persónur, og tíðindi í høvuðsstaðnum seinastu mánaðarnir hava gingið um, at Ingi er álvarsliga sjúkur, og hevur fingið eitt slag av scelerosu, sum verður kallað ALS, – ein sera ágangandi sjúka við vánaligum útlitum.

– Illgrunin er gjørdur til skammar í fyrstu atløgu. Eg havi júst verið niðri til kanningar og dómurin hjá læknunum er, at ikki er talan um ALS. Várharra er enn einaferð komin mær til hjálpar. Fyrst lekti hann meg fyri alkoholismu við at læra meg at liva edrúur ein dag í senn fyri mongum árum síðani, og nú hevur hann aftur verið við mína lið. Nógv er biðið fyri mær seinastu mánaðirnar og sjálvur havi eg verið nógv í bøn, og tað hevur hjálpt, sigur Ingi Mohr, sum er týðliga skelkaður av, at hann hann hevur verið skerdur seinastu mánaðirnar. Hann endurgevur Jeremia og Dávid og ferðabrøvini hjá Paulusi javnan teir fyrstu minuttirnar vit páta. Hann tosar sakta og er eitt sindur linur. Sjúkan, sum Ingi er sannførdur um, at hann er grøddur fyri, setir seg fyrst í munnin. Vøddarnir, sum stýra tunguni eru linari enn teir eiga at vera. Og hetta er fullkomiliga í andsøgn við tann orðafima Inga.

– Men eg havi eisini brúkt so nógv kjaft í lívinum, at talan er helst um yviranstrengisli, tí er muðurin so linur. Eg havi fingið at vita, at eg skal hvíla meg nógv, og fyri fyrstu ferð í lívinum kann eg dovnast við góðari samvitsku, sigur Ingi Mohr.

– Eg eri munandi meira eyðmjúkur í dag. Allar samkomur hava biðið fyri mær, og eg eri eisini vorðin salvaður. Eg eri vorðin munandi meira andaliga sinnaður, nú hóttafall hevur verið á. Tú setir ikki prís á eina brandstøð fyrr enn eldur er í, sigur hann.

Ingi býr á trøðni hjá abba sínum við Sundsvegin. Her hevur hann bygt síðan hann flutti niðan í 1974. Eitt hús fyri og annað eftir. Her er talan um ein heilan býling. Seinasta húsið stendur í hálvum gekki. Hann hyggur eitt sindur harmur at tí.

– Forbannað nógv fyri. Byggimyndug-



*Samrøðan gekk fyri seg í hugnaligum stovuni hjá Inga Mohr við Sundsvegin. Málningin aftan fyri seg, samanber Ingi Mohr við sítt lív, sum hevur verið ein boksikamur*